# Skiftu formannin ov tíðliga

*Fyrrverandi formaður Tjóðveldisfloksins, Heini O. Heinesen, sær stóran vanda í, at formaður floksins verður skiftur út mitt í einum valskeiði*

JOHN JOHANNESSEN

Heini O. Heinesen er eftir eykaflokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum um vikuskiftið ikki longur formaður Tjóðveldisfloksins.

Hetta er hann ikki sørt vónsvikin av, hóast hann kortini ikki er firtin um avgerðina og framhaldandi ætlar sær at virka fyri, at samstarvið í Tjóðveldisflokkinum virkar sum best.

Men kortini hevur avgerðin hjá flokstingi Tjóðveldisfloksins skapt eina ávísa misnøgd. Heini O. Heinesen vísir á, at nógvir av hansara mongu stuðlum í flokkinum eru misnøgdir um, at formaðurin brádliga er skiftur.

– Tað verður nógv tutlað um formansskiftið úti í gangunum, og heilt greitt er, at sundurlyndið er vorðið stórt um hesa avgerð.

### Ábyrgdin tikin

Heini O. Heinesen er eftir umskipanina av bygnaði Tjóðveldisfloksins kortini ikki heilt skumpaður av rókini. Hann er formaður í tingbólkinum og næstformaður í flokksstjórnini.

Kortini kennir Heini O. Heinsen tað sum, at ein stórur partur av teirri ábyrd, hann hevur havt av at halda saman upp á flokkin, er tikin frá honum, og tað líkar honum illa.

– Eg haldi meg hava megnað væl at hildið saman upp á Tjóðveldisflokkin. Harafturat haldi eg meg als ikki hava skuggað fyri Høgna Hoydal, sigur Heini O. Heinesen.

Fyrrverandi formaðurin heldur kortini, at tað er rætt av flokkinum at hava Høgna Hoydal sum andlit úteftir. Men hann vísir á, at tað krevur eitt sterkt bakland, ið kortini ikki setir Høgna Hoydal í skuggan. Og júst hetta streka baklandið metir Heini O. Heinesen seg hava verið.

– Eg havi røkt mína uppgávu sum formaður, uttan at koma so nógv fram í miðlunum alla tíðina. Og júst tað hevur verið mín styrki, eisini fyri Høgna Hoydal, sigur Heini O. Heinesen.

### Tveir vengur

Heini O. Heinesen ásannar, at tað møguliga hevði verið rætt, at framt hesa broytingina í leiðslubygnaði floksins upp undir eitt val. Tá kundi borið til at fingið politiskan vinning av henni, heldur hann.

Men Heini O. Heinesen vísir á, at tað í Tjóðveldisflokkinum eru tveir vengur, ið ikki altíð eru so heilt samdir, og annar av hesum vongum hevur leingi vilja havt Heina frá, sum formann.

– Tað hevur fyrr verið gjørt eitt ávíst arbeiði fyri at koppa meg úr stólinum, og nú skeyt ein bólkur so upp hetta uppskot, ið fekk meg frá.

– Eg haldi, at flokkurin eigur at hava eina grundgeving fyri at skifta formannin út, sigur Heini O. Heinesen og vísir á, at hann aldri sjálvur hevur biðið um at gerast formaður Tjóðveldisfloksins.

Men hóast Heini O. Heinesen seinastu tíðina hevur kent seg eitt sindur hóttan frá øllum síðum, kennir hann seg kortini ikki forfylgdan. Tí ætlar hann sær framvegis at royna at arbeiða so væl sum møguligt saman við øllum pørtum í flokkinum.

### Heldur fram

Heini O. Heinesen sigur, at hann sjálvur fleiri ferðir seinastu tíðina hevur hoyrt slatur um, at hann fer at leggja frá sær í politikki. Men hetta er bert slatur.

– Eg ætli mær at halda fram í politikki so leingi eg eri mentur og verði valdur, sigur fyrrverandi formaður Tjóðveldisfloksins.

## Løgreglan ávarar um falskar pengaseðlar

*Fýra falskir hundrað krónu seðlar eru brúktir í TB-húsinum á Tvøroyri*

EYÐUN KLAKSTEIN

Løgreglan á Tvøroyri ávarar nú fólk um, at falskir pengaseðlar eru í umfari í Suðuroynni.

Løgreglan hevur fingið fýra hundrað krónur seðlar á støðina, sum vórðu brúktir í TB-húsinum næstseinasta vikuskifti, tá dansur var har.

– Hetta er eitt sera álvarsamt mál, og slíkt brot á lógina kann hava langa fongsuslsrevsing við sær, sigur vakthavandi á løgreglustøðini á Tvøroyri.

Løgreglan veit ikki, hvør hevur gjørt og brúkt pengaseðlarnar, men tey eru farin undir kanningarnar av málinum.

Fyri fyrst mugu vit ávara fólk um, at onkur er, sum framleiðir og brúkar falskar pengaseðlar í Suðuroynni, sigur løgreglan á Tvøroyri.

Sambært løgregluni líkjast seðlarnir teimum veruligu, men tað ber til at síggja, at teir eru falskir.

Og í øllum førðum eydnaðist tað fólki at brúka teir næstseinasta vikuskiftið.

## Nærvarpið fingið nýggja nevnd

Nærvarp Okkara í Keypmannahavn hevur fingið nýggja nevnd, eftir at eykaaðalfundur varð hildin áðrenn vikuskiftið.

Í nýggju nevndini sita nú Rúni J. Jacobsen, sum er formaður, Oddur Hansen, næstformaður, Mallan Jákupsdóttir, kassameistari og skrivari, og Stephan Thomsenog Jan Pedersen eru tiltakslimir.

Nýggja nevndi arbeiðir við at savna pening til frama fyri Nærvarpið, og nevndin ætlar sær at søkja føroyskar stovnar um stuðul, tí tað er tungt at reka Nærvarpið.

Fyrsta málið hjá nevndini verður at fáa avtalu í lag við KODA, um at peningurin frá Nærvarpi Okkara skal fara til føroyskar tónleikarar.

Í løtuni fara pengarnir, sum Nærvarpið letur KODA, til danskar tónleikarar, sigur Nærvarpið í tíðindaskrivi.

Fráfarandi nevndin takkar teimum tíðindafólkum í Føroyum, sum hava latið Nærvarpinum tíðindini, og vónar at samstarvið kann halda fram.



*– Tá limir frá virkna baklandinum eru í floksstjórnini, gevur hetta góðan íblástur frá baklandinum og inn í politikkin, sigur Høgni Hoydal*

# Baklandið skal fram

*Nýggi formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, sigur høvuðsøkina til nýggja leiðslubygnað floksins vera, at sterka baklandið skal fáa størri ávirkan*

JOHN JOHANNESSEN

Gamli, tvístreingaði leiðslubygnaður Tjóðveldisfloksins gjørdi, at ov lítið samskifti var millum tingmanningina og baklandið. Tí var neyðugt at broyta leiðslubygnaðin.

Nýggi formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, sigur, at leiðslubygnaðurin varð broyttur fyri at sleppa undan hesum, og fyri at lata baklandið í flokkinum fáa størri ávirkan á politikkin.

– Tá limir frá virkna baklandinum eru í floksstjórnini, gevur hetta góðan íblástur frá baklandinum og inn í politikkin, vísir Høgni Hoydal á.

### Neyðugt nú

Høgni Hoydal er ikki samdur við teimum, ið siga, at leiðslubygnaðaurin varð broyttur ov knappliga. Hann vísir á, at tað var neyðugt at gera broytingarnar nú, flokkurin og Føroyar hava ógvuliga umráðandi mál at taka støðu til.

Nýggi formaður Tjóðveldisfloksins sigur tað vera ógvuliga umráðandi at fáa flokkin at virka framúr val, áðrenn farið verður til fólkaatkvøðu um fullveldismálið. Tí er neyðugt at fáa skipað flokkin væl og virðiliga nú, og ikki tá komið er so langt, at fólkaatkvøðan er komin undir land.

Eisini heldur Høgni Hoydal, at bygnaðarbroytingin fer at styrkja flokkin til eitt komandi val. Hann vísir á, at nýggi bygnaðurin fer at gera tað lættari at samskipa flokkin, og tí eigur hann at koma at virka væl av hesum.

### Standa í skotlinjuni

Høgni Hoydal ásannar, at broytingin av leiðslubygnaðinum í flokkinum og aðrir trupulleikar, Tjóðveldisflokkurin seinastu tíðina hevur havt at dragast við, er frálíkt høvi hjá mótstøðufólki at finnast at flokkinum.

Ikki minst heldur Høgni Hoydal læraraverkfallið vera eitt gott høvi at finnast at honum og flokkinum. Men hann vísir samstunis á, at tey ikki hava grein í sínum máli.

– Sjálvsagt kann eg ikki halda fram sum landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, men so leingi eg eri tað, leggi eg fulla orku í starvið, sigur Høgni Hoydal.

Formaður Tjóðveldisfloksins metir seg ikki at hava tikið á seg ov nógvar uppgávur, nú hann eisini er vorðin formaður floksins. Hann vísir á, at tað í formanssessinum ræður um at býta uppgávurnar út.




3 ferðir um vikuna til Íslands:



MÁNADAG

MIKUDAG

FRÍGGJADAG

Ofta er ein noyddur at skræða eina heila viku úr kalendaranum fyri at fara til Íslands. Tað nýtist tær ikki longur. Tí nú verður flogið 3 ferðir um vikuna til Íslands, og so er gamaní at seta ferðina saman soleiðis, at sleppast kann aftur og fram tá tað hóskar tær best.

**Til Íslands í handilsørindum:**
Flúgv til Íslands mánadag kl. 17.30 og kom aftur mikudag kl. 11.30, ella fríggjadag kl. 18.30

**Vikuskiftistúr í Reykjavík:**
Flúgv til Íslands fríggjadag kl. 17.30 og kom aftur mánadag kl. 18.30



Vit hava nógv góð tilboð til Íslands í ferðafaldara okkara "Út í heim"

SANSIR TEL 355355

*Atlantic Airways*

Tel 333 900 · www.atlanticairways.fo